# Suðuroyingar fingu gávur fyri 300.000 krónur

**GÁVUREGN** Fríggjadagin var Lions klubburin í Suðuroy á rundferð í oynni við 15 gávum til almannagagnlig og mentanarlig endamál

» Hjartastartarar verða hongdir upp, har vanliga nógv fólk savnast

Áki Bertholdsen

Lions klubburin í Suðuroy fyllir 25 ár í ár og í hesum sambandi gjørdi klubburin av at hátíðarhalda dagin við at lata øllum bygdum og býum í oynni gávur.

Gávurnar fara til mentanarlig og almannagagnlig endamál og tilsamans vórðu 15 gávur fyri einar 300.000 krónum lætnar til ymisk endamál runt um í oynni.

Í hesum sambandi fekk Savnið á Mýri í Hovi 10.000 krónur at gera kjallaran fyri. Tað sama fekk Grindabátaog Bátasavnið í Vági og bygdarhúsið í Lopra, sum skal brúka peningin til ábøtur á oljufýringina. Bygdarfelagið í Sandvík fekk eisini 10.000 krónur til at gera brúsurúm í bygdarhúsinum fyri og bygdarhúsið í Fámjin fekk somuleiðis 10.000 krónur, sum skulu brúkast til at keypa eina neyðtrappu til húsið. Og at enda fekk eisini Ruth Smith savnið í Vági 10.000 krónur.

Fornminnisfelegið í Porkeri fekk 15.000 krónur til at gera gomlu húsini í Eystrum fyri og somu upphædd fekk Dansifelagið í Sumba til at keypa útgerð fyri til at taka føroyskan dans upp.

Annars vórðu 50.000 krónur lætnar til ætlaðu lundina, ætlanin er at gera í Vági og Fornminnissavnið á Tvøroyri fekk 70.000 krónur til ábøtur á Gestastovuna, sum er elsta húsið á Tvøroyri.

Og í Hvalba vórðu 40.000 krónur lætnar til ætlaða kolasavnið í bygdini.




**GÁVUR** *Dýra Biðidag koyri Lions Klubburin runt í Suðuroy við gávum til mentanarlig og almannagagnlig endamál. Er eru tað Sandvíkingar, sum eru komnir at taka ímóti*

### Hjartastartarar

Umframt hesar gávurnar, læt Lions klubburin í Suðuroy eisini fýra hjartastartarar, sum skulu hongjast upp á plássum, har vanliga nógv fólk savnast. Hesar gávurnar hava eisini kommunurnar í Hvalba, Tvøroyri og Porkeri, umframt at Suðuroyar Sparikassi, BankNordik, Lív og Trygd, eisini stuðla.

Hjartastartararnir verða hongdir upp í Roynhøllini, Ítróttarhøllini í Trongisvági, í Skúladeplinum í Suðuroy og í ítróttarhøllini í Vági.

Tað patenta við hjartastartarum av hesum slagi, er, at teir so lættir at brúka, at øll kunnu læra tað.

Men seinni í ár fer Lions í Suðuroy eisini at skipa fyri skeiði í at brúka teir.

# Óheppið at stuðulin verður strikaður

Áki Bertholdsen

- Tað er øgiliga óheppið, at ætlanin nú er at strika stuðulin til skipasmíð í Føroyum.

Tað heldur Aðalstein Anthoniussen á AWI Føroyar, sum ger smáar bátar til útróður, alivinnuna og annað.

Hann sipar til at samgongan hevur lagt uppskot fyri løgtingið, har ein partur er at strika játtanina til skipasmíð í Føroyum.

Í hesum sambandi ger AWI Føroyar vart við, at tey eru í ítøkiligum samráðingum við eina alifyritøku um at byggja tveir alibátar í ár fyri tríggjar milliónir í alt.

Tí heitir AWI á Løgtingið um ikki at strika alla játtanina til stuðul til skipasmíð, men heldur at minka hana niður í kr. 240.000 í ár, sum er 8% av trimum milliónum.

### Verri kappingarføri

Aðalstein Anthoniussen sigur, at endamálið við stuðulinum var at javntseta føroyskar skipasmiðjur við skipasmiðjur uttanlands.

Stuðulin er átta prosent av byggikostnaðinum.

- Skipasmiðjur í Føroyum hava serligar útreiðslur til farmaflutning aftur ímóti skipasmiðjum uttanlands stuðulin var settur í verk fyri at bøta um okkara kappingarføri.

Aðalstein Anthoniussen sigur, at í teimum tilboðum, tey hava givið, er stuðulin roknaður upp í og tí er tað serstakliga óheppið, at stuðulin verður tikin av nú í einum høggi, uttan nakra sum helst freist.

- Fyri landið eru hetta smápengar, men verður stuðulin tikin av, verður okkara kappingarførið átta prosent verri, enn tað hevur verið og so verður tað tórført at varðveita skipasmíð, sigur hann.

aki@sosialurin.fo